

## Ísland

### SJÓNNI'S FRIENDS
### »COMING HOME«

( SJÓNNI BRINK, THORUNN CLAUSEN )

Sigurjón Brink, kallaður Sjónni, (1974-2011) luttók í íslendska grand prixinum 2006, 2007 og í fjør. Í ár skuldi hann eisini havt verið við, men tvær vikur áðrenn kappinina, varð hann funnin deyður í heiminum. Avgerð var tikin um, at sangurin hóast alt skuldi við í kappingina, og vinmenn hjá Sjónni skuldu framføra hann. Teir vunnu og umboða nú Ísland í finaluni leygarkvøldið. Sangurin eitur »Coming Home«.



## Finland

### PARADISE OSKAR
### »DA DA DAM«

( AXEL EHNSTRÖM )

Ungi Axel Ehnstrøm, ið kallar seg fyri »Paradis Oskar« eftir eini bók hjá Astrid Lindgren hevur sjálvur skrivað og gjørt lag til sangin »Da Da Dam«. Sangurin er um ein drong, ið vil bjarga heiminum.



## Svøríki

### ERIC SAADE
### »POPULAR«

( FREDRIK KEMPE )

Eric Saade luttók í svenska grand prixinum í fjør við sanginum »Manboy«, ið gjørdist ein sonn landaplága. Í ár royndi hann aftur eydnuna við sanginum »Popular«, og hesuferð eydnaðist betri. Hann vann og umboðar Svøríki leygarkvøldið. Nógv vilja verða við at Eric Saade hevur góðar møguleikar at vinna kappingina.



## Danmark

### A FRIEND IN LONDON »NEW TOMORROW«

( LISE CABBLE & JAKOB SCHACK GLÆSNER )

Indiepoppbólkurin »A friend in London« eru vælkendir í Danmark og í Kanada, har teir eisini hava verið á konsertferðum. Teir fýra, sum eru við í bólkinum, hava spælt saman, síðani teir hittust á einum skúla í Vostrup 2005. Sangurin »New Tomorrow« er um at bjarga heiminum.